Spurningar og svar til útboðið: Rammusáttmála fyri flutning av vøru til Føroyar

**Spurningur settir gjøgnum teldupost. Svaraður 11.05.26:**

Spurningur 1 - Tollur

Apoteksverkið hevur einkarætt at innflyta og tolla heilivág. Tvs at vit ikki fáa bjóðað tollavgreiðslu uppá sendingar, ið innihalda heilivág.

Kunnu vit bert bjóðað tollavgreiðslu fyri tær sendingar, sum ikki innihalda heilivág?

Svar
Vit góðtaka, at tá veitarin bjóðar seg at tollavgreiða, so er tað við teimum avmarkingum, sum fylgja lógum og reglum innan øki.

----

Spurningur 2 - Tollur

Rúsdrekkasølan hevur einkarætt at innflyta og tolla alkohol. Tvs at vit ikki fáa bjóðað tollavgreiðslu uppá sendingar, ið innihalda alkohol.

Kunnu vit bert bjóðað tollavgreiðslu fyri tær sendingar, sum ikki innihalda alkohol?

Svar
Vit góðtaka, at tá veitarin bjóðar seg at tollavgreiða, so er tað við teimum avmarkingum, sum fylgja lógum og reglum innan øki.

----

Spurningur 3 - Tollur

Stórar verkætlanir

Kunnu vit í serligum førum í samband við innflutningi av útgerð o.ø. til størri verkætlanir eitt nú byggiverkætlanir, eitt nú Glasir, Landssjúkrahúsið, tunlar sum strekkja seg yvir longri tíð. Kann man seta sum krav, at vit antin frábiðja okkum at standa fyri tollavgreiðsluni ella sum minimum fáa ein kontaktpersón, sum kann veita øll neyðug skjøl og kunning. Hetta kann verða sera umfatandi og tí neyðugt hjá okkum við neyvum innliti.

Svar
Vit góðtaka, veitarin kann seta rímiligar treytir til okkara stovnar, tá tollavgreitt verður, soleiðis at tryggjað verður, at samstarvið gongur væl. Ábyrgdin fyri at ein vøra verður tollavgreidd liggur hjá stovinum fyrst og fremst, eitt nú at fáa til vega upplýsingar, sum tollavgreiðarin hevur tørv

á. Eisini kann verða rímiligt at ein kontaktpersónur verður ásettur (kanska fleiri á størri stovnum).

----

Spurningur 4 - Prísur

Undir viðheft skjøl "*Upplýsing um prís á flutning samanlagt*"

À rekkju 26 á excel arkinum verður spurt um prís á pakkar (3 stk, eins)

Er hetta prísur á tríggjar eins pakkar, ið fylla samanlagt 0,5 m3 og vektin samanlagt er 40 kg á øllum trimum pakkunum?

Hetta kemur eisini fyri á rekkju 15 og 37 à Pakkar (3 stk, eins)

Svar

Ja, hatta eru 3 eins pakkar, sum samanlagt fylla 0,5 m3 og vekt er samanlagt 40kg – men í 3 kolli

---

**Spurningur settur gjøgnum teldupost. Svaraður 04.05.26:**

Spurningur: Hvussu við "variablum" kostnaðum, s.s vørugjald frá Tórshavnar Havn. Er tilboðið eksl. teir ?

Svar: Tilboðið er eksklusivt vørugjald til havnirnar í Føroyum. Tað er ræ ttuliga stórur munur av vørugjaldi í Føroyum, alt eftir hvat vøran er, so tað ber ikki til at seta ein miðalprís.

---

**Spurningur settur gjøgnum telefon og svaraður 24.04.26:**

Spurningur: Hvussu stórar nøgdi av farmi er talan um?

Svar: Vit hava tíverri ikki tey neyvu hagtølini, men hava í útbjóðingartilfarinum upplýst virðið.

---